# Heimurin skrivast í manntal í 2010



**Tað er ikki fyri at kenna neyva fólkatalið, at ST heitir á heimsins lond um at seta í verk fólkateljing í 2010. Endamálið er heldur regluliga at tryggja grundina undir dyggari informasjón um tey kor, sum hvør einstakur samfelagsbólkur livir undir**

FÓLKATELJING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hvørt tíggjunda ár ger ST átøk fyri at fáa øll lond heimsins at seta í verk fólka- og bústaðateljingar. Hetta átakið verður kallað „Census 2010" - manntal 2010 - og er tað ein áheitan um at seta í verk fólkateljingarátøk millum 2005 og 2014, so at hagtalsgrundarlagið um livikor hjá øllum heimsins fólkum verða dagførd og sambærligt.

## Norðurlond - elektroniskar skráir

Norðurlond standa yvirhøvur frammalaga, tá um ræður informasjón um samfelagskorini og íbúgvarnar. Verri stendur til aðrastaðir. Serliga í londum, sum antin ikki eru før fyri at fremja fólkateljingar ella samfelagsinformasjón yvirhøvur. Antin tí tey eru ov fátøk og illa stødd við útbúgving, ella tí at ófriður og ruðulleiki forðar fyri slíkum skipaðum samfelagsgagnligum átøkum.

Av norðurlondum standa danir allarfremst í málinum um fólkateljingar. Fyrsta landið í heiminum, ið fekk upplýsingarnar um fólkið í elektroniskar skráir, var helst Danmark, sum í 1981 framdi sína fyrstu fólkateljing uttan oyðibløð. Eftir hetta eru viðurskiftini um familju, bústað, útbúgving og arbeiði regluliga skrásett, uttan at neyðugt hevur verið við vanligari fólkateljing aftur. Í hølunum á teimum eru Finland, Svøríki og nú Noreg eisini komin so langt áleiðis, at óneyðugt er við vanligari fólkateljing, tí eisini har eru allar týðandi upplýsingar um borgararnar í elektroniskum skráum.

Síðani sexti- og sjeyiárini hava øll norðurlond brúkt regluligu fólkateljingarnar til at grunda elektroniskar skráir, so at hvørt fólkateljingarumfar var alt minni treytað av at borgararnir skuldu skriva upplýsingarnar á oyðibløð. Danir vóru sum sagt fremstir, og eftir tríati árum eru øll norðurlond so komin hagar til, at reglulig skráseting fer fram um flestu sosialu viðurskifti borgaranna og um bústaðir teirra.

Landsfólkaskráirnar í norðurlondum eru knýttar til skráir um bústaðin, um húskið ella familjuna, skráir um útbúgving borgaranna, arbeiðsviðurskifti og inntøkur teirra og í summum londum til upp aftur fleiri skráir. Á henda hátt verða fólkateljingar at enda óneyðugar, tí feskar upplýsingar alla tíðina eru tøkar um viðurskifti borgaranna.

Fyrimunurin við elektronisku skráunum er, at tá er støðugt yvirlit tøkt um øll týðandi viðurskifti í samfelagnum, heldur enn við fimm ella tíggju ára millumbilum.

## Føroyar spæla ikki við

Danska fólkateljingin í 1976/77 var fyri mesta partin grundað á elaktroniskar skráir, men serlig fólkateljing á oyðibløð var í 1977 framd í Føroyum. Í 1981 taldu danir ikki okkum uppí, tí tær elektronisku skráirnar umfataðu bara borgararnar í sjálvum Danmark - ikki Føroyum og Grønlandi – tí hagtalsmál eru ikki ríkismál. Ábyrgdina av samfelagsupplýsandi hagtalsinformasjón um Føroyar er føroyskt málsøki og tað er tí fult og heilt føroyska fólkaræðið, sum tekur avgerð um informasjónin skal vera á norðurlendskum støði ella ikki.

Skomm at siga frá - men síðani danir góvust at skráseta hesar týðandi samfelagsupplýsingar, hava føroyskir myndugleikar ikki tikið upp sama góða sið. Í danska ríkinum, og tessvegna eisini í Noreg, hava fólkateljingar verið regluligar heilt síðani miðja nítjandu øld, sum hava lagt grund undir góða fyrisiting og givið møguleikar at kunna seg við samfelagskorini hjá íbúgvum landsins.

Slíkt eyðkennir framkomin lond - serliga norðurlond.

## Sjálvt tilafturskomin lond

Í dag eru nógv av framkomnu londunum komin hagar til, at upplýsingar um viðurskifti borgaranna eru dagliga tøkar í KT skipanum, heldur enn á oyðibløðum, sum savnað verða saman hvørt fimmta ella tíggjunda ár. Fleiri lond, harímillum eystureuropeisk, hava sett sær sum mál at lata fólkateljingina í 2010 vera seinastu teljingina á oyðibløð, og heldur brúka tøku kunningartøknina til at fremja hagtøl um samfelagligu viðuskifti borgaranna.

*Nú skulu vit finna útav, hvussu nógv vit eru. Í 2010 skal fólkatalið í heiminum aftur skrásetast*

Ikki bara framkomin lond, men eisini lond ið vit meta vera minni framkomin, hava sett sær fyri at fáa slíkt hagtalsgrundarlag í elektroniskar skráir í sambandi við fólkateljingarátakið hjá ST. Allarflestu lond í heiminum fremja fólkateljingar við fimm ella tíggju ára milumbili, eisini blóðfátøk og pinkulítil lond í Afrika og Asia. Haraftrat eru nógv teirra eisini komin væl áleiðis við at menna umfatandi hagtalsligt grundarlag, sum kann geva teimum eina haldgóða mynd av samfelagsviðurskiftunum. Lond í Eystureuropa eru somuleiðis væl á leið økomin, tá talan er um at menna hagtalsgrundarlag við nútímans kunningartøkni.

Garmin tað besta á marknaðinum




Vegvísari til bilin frá 4.595

STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

***Hjálparfólki til breyðsøludeildina***

**at byrja skjótast til ber**

**Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.**

**Arbeiðsuppgávur:**

**At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.**

**Arbeiðstíð:**

**Um 25-30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn leygardag fyrrapart**

**Vit rokna við, at tú ert:**

- **Røkin**
- **Blíðlíg/ur av lyndi**
- **Álítandi**
- **Fleksibul**
- **Trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum**

**Løn:**
**Smbrt. S & K sáttmálanum**

**Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:**

**Keypssamtøkan**
**í Dr. Jakobsensgøtu**
**Postsmoga 349**
**FO-110 Tórshavn**
**Tel 31 13 20**

**Att.: Bo Møller**
**Fartel 217593**

fk

SKEMMAN | søkir handilslærling



## Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

**Vit bjóða:**
· Møguleika fyri altjóða útbúgving
· Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
· Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
· Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709
SKEMMAN

petur & petur • 320870